## UEFA kann missa EM

UEFA hóttir nú Ukraina við, at landið kann missa møguleikan fyri at hýsa EM-endaspælinum í fótbólti í 2012, tí fyrireikingarnar eru langt aftan fyri løgdu ætlanirnar. Serliga er tað byggingin av einum stórstadion í Kiev, ið dregur út, og tað hevur fingið UEFA-forsetan, Michel Platini, at herða treytirnar, samstundis sum hann viðgongur, at UEFA hevur eina ætlan-B, um Ukraina ikki klárar tingini til tíðina.



## Sensatiónir í Miami

Fleiri av fremstu spælarunum í WTA-tenniskappingini í Miami í hesum døgum standa fyri falli. Svetlana Kuznetsova, sum var styrkimett, sum nummar eitt, fór út í fjórða umfari, og somuleiðis Victoria Azarenka, sum var styrkimett sum nummar fýra. Venus Williams yvirlivdi akkurát, tí hon mátti út í trý sett, áðrenn hon kom víðari.

# Ljósið sýndi fram

Leygardagin hevði fimleikafelagið Ljósið sín árliga framsýningardag, ið fevndi um tvær framsýningar í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Tey yngru byrjaðu klokkan 14 og tey eldru klokkan 18.

Limatalið hjá Ljósinum er í vøkstri, og tí er neyðugt hjá Ljósinum at hava tvær framsýningar.

Fleiri hundrað íðkandi hava verið í gongd í vetur, og felagið hevur einar hálvthundrað leiðarar at taka sær av mongu fimleikarunum.

Á hesum báðum síðum sæst eitt úrval av myndum, sum myndamaður okkara, Álvur Haraldsen, tók í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin.

**hil**











